# HS venjingarlega - Dagbók 6. og 7. apríl 2012

**6. apríl:**

Vit vaknaðu til ein morgun við mjørka og regni. Vit fóru frá “Room with a view” klokkan 07.20, tí at vit skuldu venja klokkan 8.00 í høllini í Hafnarfyri. Eftir venjingina fóru vit at venja “vatn-flogbólt”, tí at eitt lið hjá SH hevur bjóðað okkum av at spæla ein dyst ímóti teimum. Síðani varð farið heim aftur á hotellið at eta og slappa av, inntil næstu venjing klokkan 15.00




Ikki serliga nógvar myndir hava verðið tiknar av høll, svimjarum og tílíkum, tí at Óli, ið vanliga er myndamaður, hevur verið heilt upptikin av at gera okkum mat (nógvan mat!). So tí valdi hann at koma við okkum til venjing seinnapartin. Hann tók nógvar myndir, og eisini onkran film. Onkrir av svimjarnum gjørdust, sum tímarnir liðu, meira og meira ørkymlaðir, tí at Óli fór ikki heim, og teir hildu tí, at eingin døgurði fór at verða hetta kvøldið.




Men so var ikki. Tí at eftir venjingina fingu vit at vita, at vit skuldu á matstovu at eta.

Matstovan, ið vit vóru á, eitur “Fjørukráin”, og har fingu vit lekkurt lambskjøt og okkurt omaná. Tó vóru ikki øll, ið dámdu henda góða mat. Fyrst var tað Bjørk, ið segði frá. Hon fekk tí ein burgara ístaðin. Tummas og Bartal vóru bara glaðir fyri restirnar fra Bjørk, tí at teir vóru ikki vorðnir heilt mettir enn. Men tá ið Markus sá hvat Bjørk fekk ístaðin, var hann skjótur at rópa upp, at honum dámdi heldur einki hetta kjøti.






Tá ið vit høvdu etið, fóru vit heim. Nakrir av svimjarunum hava frí í morgin, so teir fóru eitt sindur seinni í song enn hini, ið skulu venja.

**7. apríl:**

Morgunvenjing var aftur í mrogun klokkan 8.00. Tó sloppu tey, ið ikki skuldu venja, at sova eitt sindur longri. Næstan øll av teimum, ið ikki vandu, fóru yvir í Smáralind sentrið klokkan 10. Tá ið hini vóru liðug at venja, fóru tey í KFC (Kentucky Fried Chicken), sum dreingirnir hava plága um at fara í allan túrin.



Seinna venjingin var frá klokkan tvey til klokkan fýra. Eftir venjingina, ótu vit lekkran fisk, sum Óli hevði gjørt, og gjørdu síðani sum okkum listi í eina løtu. Klokkan níggju høvdu Lena og Kristina bakað pannukøkur, ið smakkaðu óføra væl. Síðani fóru vit í heita pottin uttanfyri, og so í song.



**Heilsan**
Genturnar á kamari 314
Annika, Bjørk og Beinta